Lydia Didriksen
Eg vil heim
Myndir: Trina Gaard

Abbi.

Omma.

Her eri eg,

og her er Ninus.

Eg og Ninus sova
hjá abba og ommu.



Eg og Ninus vakna.
Tað er myrkt.

Mánin lýsir.

„Hygg, Ninus,
mánin er ein bátur.“

„Mánin er ein
vátur bátur, Ninus.“



„Mánin er ein
kátur, vátur bátur, Ninus.“

„Og eg eri Pól,
sum melur sum ein sól
um heyg og hól,
sigur mamma.“

Abbi og omma sova ikki,
og nú vil eg heim.

„Omma, eg vil heim!“

„Ert tú uppi?“ spyr omma.
„Ja, nú havi eg sovið,
og nú vil eg heim.“

„Abbi, koyr meg heim til mammu.
Ninus vil heim í sína song.“

„Eg kann koyra teg og Ninus
heim,“ sigur omma.

„Hey mamma, nú eri eg her.“

Mamma mussar meg.
„Nú er seint, og tú mást sova!“

„Mánin vakti meg og Ninus.
Eg sá hann sigla.



Mánin er ein kátur, vátur bátur.“

„Og tú ert mín Pól,
sum melur sum ein sól
um heyg og hól,“
sigur mamma.

„Og nú vil eg sova, mamma,
góða nátt!“